

## "Kært barn har mange navne...."

Sjálvt um tú kennir bygdamørkini í gomlu Runavíkar kommunu rímiliga væl, kunnu kortini trupulleikar standast, tá tú skalt brúka hesi nøvn í skrift – og talu. Tað er nú einaferð soleiðis, at tey fólk, sum eru uppvaksin á staðnum og kring um í økinum, eru góð við hesi nøvn og ganga høgt uppí, at tey verða brúkt rætt.

Og einki er meiri rímiligt enn tað, at hesi nøvn verða brúkt rætt.

Spurningurin er bara, hvat er tað rætta, og tað er her, at trupul-leikin liggur, haldi eg.

Tað er serliga markið millum Runavík og Saltangará, sum viðhvørt kann kennast sum ein trupulleiki, og serliga tá ræður um havnarlagið í kommununi.

Ikki so sjáldan fært tú, sum regluliga skrivar um hetta økið, viðmerkingar um, at tú "... aftur ert farin skeivur..."

Kommunuskrivstovan hjá Runavíkar kommunu eins væl og Kunningarstovan, sum húsast undir sama taki, liggja ikki innan bygdamarkið í Runavík – men í Saltangará.

Bygdamarkið í Runavík gongur so stutt inn, og tí stinga hesir trupulleikar seg upp.

Tey eru mong, sum ivaleyst vildu, at Runavíkin rakk longur inn, soleiðis at hesir trupulleikar ikki stungu seg upp.

Men tað er nú einaferð soleiðis, sum tað er.

Kommunuskrivstovan hjá Runavíkar kommunu liggur í Saltangará, eins og Kunningarstovan eisini ger tað.

Ein annar afturvendandi trupulleiki í skriving er landingarmiðstøðin Kongshavn, sum sjálvandi liggur á økinum hjá Runavíkar havn. Hitin liggur á økinum hjá Runavíkar havn.

Men hyggur tú eftir bygdamarkinum, liggur landingarmiðstøðin Kongshavn langt innan fyri Runavík – og heilt undir Høgabóli og niðanfyri Nordik Bank, sum sjálvandi eru í Saltangará.

Vit, sum skriva, kundu sjálvandi sagt, at landingarmiðstøðin liggur á økinum hjá Runavíkar havn, men eg haldi, at hetta ger tingini so trupul.

Taka vit bygdamarkið, ber illa til at siga, at landingarmiðstøðin liggur í Runavík, tí tað ger hon bara ikki. Hon liggur altso í Saltangará, men á økinum hjá Runavíkar havn.

Og so er tað hin spurningurin, um rættari hevði verið at sagt "við Saltangará" – heldur enn "í Saltangará".

Áhugavert hevði verið at tikið allar hesar spurningar upp.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Djúp og breið?




Gjógvin millum rík og fátøk gerst djúpari og djúpari sambært Sosialinum

## Í MORGIN




8-13 m/s 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin upp í ein strúk av norði. Sólglottar, men kanska okkurt kavaælið. Hitin millum 1 og 4 stig.

## SUNNUDAGIN




3-8 m/s 7-12 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig - mánanáttina frost.

## MÁNADAGIN




1-6 m/s 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin av ymsum ættum. Turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýstið, 997 hPa. í landnyrðing norðan úr Føroyum fer eystureftir.



**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Skotland fer spakuliga í landsynning. Høgættin yvir Føroyum stendur væntandi við alt vikuskifti.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen**
greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

14. okt Fyrra kvarter
18. okt Mánin longst frá jørðini
23. okt Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. okt. | 06:36 | 18:56 | 05:36 | 17:56 | 05:51 | 18:11 | 08:36 | 20:56 | 09:36 | 21:56 | 04:51 | 17:11 | 03:51 | 16:11 | 06:51 | 19:11 | 07:51 | 20:11 | 06:21 | 18:41 | 07:36 | 19:56 |
| 23. okt. | 07:16 | 19:36 | 06:16 | 18:36 | 06:31 | 18:51 | 09:16 | 21:36 | 10:16 | 22:36 | 05:31 | 17:51 | 04:31 | 16:51 | 07:31 | 19:51 | 08:31 | 20:51 | 07:01 | 19:21 | 08:16 | 20:36 |
| 24. okt. | 07:57 | 20:19 | 06:57 | 19:19 | 07:12 | 19:34 | 09:57 | 22:19 | 10:57 | 23:19 | 06:12 | 18:34 | 05:12 | 17:34 | 08:12 | 20:34 | 09:12 | 21:34 | 07:42 | 20:04 | 08:57 | 21:19 |
| 25. okt. | 08:41 | 21:04 | 07:41 | 20:04 | 07:56 | 20:19 | 10:41 | 23:04 | 11:41 | - | 06:56 | 19:19 | 05:56 | 18:19 | 08:56 | 21:19 | 09:56 | 22:19 | 08:26 | 20:49 | 09:41 | 22:04 |
| 26. okt. | 09:28 | 21:53 | 08:28 | 20:53 | 08:43 | 21:08 | 11:28 | 23:53 | 00:04 | 12:28 | 07:43 | 20:08 | 06:43 | 19:08 | 09:43 | 22:08 | 10:43 | 23:08 | 09:13 | 21:38 | 10:28 | 22:53 |